

# MÁL OG MIÐ

## ALMENN FYRIBYRGING Í **SSP**

## 2016 – 2017

SSP | Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi

# Fyribyrging er ikki bara bara



Tað er ein sannroynd, at tað eru ymiskar fatanir av, hvat SSP skal takast við. Fyri meg gevur kriminalitetsfyribyrging í sjálvum sær onga meining. Um vit fylgja ráðnum frá Det Kriminalitets-forebyggende Råd í Danmark, er ikki nóg mikið at gera átøk, ið eru kriminalitetsfyrbyrgjandi. Tá eru vit oftani ov sein á sjóvarfallinum.

Hyggja vit eftir hugtakinum fyribyrging, so er tað í roynd og veru at forða fyri eini óynsktari støðu. Tað almenna vil, at vit forða fyri, at fólk roykja, fremja kriminalitet, ovurnýtslu av rúsdrekka, nýtslu av rúsevnum, vanlukkum í ferðsluni, ágangi á sosialu miðlunum, kynsligum ágangi osv. Listin er alinlangur, um hvørjar støður, vit ikki vilja hava. Tað legst bara afturat listanum, so vit eru um at missa ondina. Rákið er, at vit detta nærum um beinini á hvør øðrum í berari vælvild og egnum áhugamálum fyri at gera tað „góða“.

Tí skulu vit, heldur enn at „sløkja eldar“, leggja doyðin á tann uppbygjandi partin, at menta okkara unga ættarlið til at verða góðar samfelagsborgarar, ið taka atlit til bæði seg og tað samfelag, tey eru partur av.

Allýsingin í fyribyrgingarmyndlinum vísir greitt, at tað eru tey uppbyggjandi tiltøkini, sum stuðla undir tey fyribyrgjandi tiltøkini. Endamálið er at skapa øllum í samfelagnum góð, trygg og mennandi kor. Ein viðkomandi táttur í uppbyggjandi liðinum í SSP er at hitta foreldur, møta børnum og ungum, har sum tey eru, og at skipa samband millum foreldur. Hesin arbeiðsháttur hevur sannført meg um, av SSP hevur nakað upp hjarta.

SPP, eins og ein hvør onnur skipan, hevur tørv á at fylgja við tíðini. Flemming Balvig, professari og granskari innan kriminilogi vísir á, at tørvur er á at endurskoða fyribyrgjandi arbeiðið í SSP. Fyrst og fremst er neyðugt, at øll og allir tættir í samfelagnum eru partur av fyribyrgjandi arbeiðinum. Hagtøl vísa, at kriminaliteturin minkar. Samstundis hoyra vit og vita, at nógv børn og ung eru einsamøll, hava sálarligt órógv og stríðast við at vera partur av felagsskapinum. Hann mælir til, at SSP gevur sær fær um at síggja heildarstøðuna og menna lívsførleikarnar hjá øllum børnum og ungum. Hansara boð er, at vit, ið arbeiða innan SSP samstarvið, skulu síggja okkum sum konsulentar í vælferð og trivnaði og ikki bara arbeiða við fráveru av kriminaliteti.

Taka vit hesi hyggjuráð til okkum, ber av røttum til at siga, at vit eru á góðari leið.

*Óli Rubeksen,*
*SSP ráðgevi*

# Hetta gera vit

Grundarsteinurin undir fyribyrgingar-
arbeiðinum er at skapa *øllum* í samfelagnum
góð, trygg og mennandi kor.

**SSP** hevur tað góða í lívinum í fokus og hevur hesi tilboð í fólkaskúlanum:

SPÆLIBÓLKAR frá skúlabyrjan

KNÝTA BOND millum foreldrini

TRYGGARI Á NETINUM í 4. flokkunum

UNG & LÍVIÐ í 7. – 8. flokkunum

**POLITIIÐ** bjóðar hesa undirvísing:

1. FLOKKUR – ferðsla

6. FLOKKUR – etikkur á netinum

9. FLOKKUR – harðskapur + revsiváttan

SSP

# Fyribyrgingar

Danski stovnurin *Det Kriminalpræventive Råd* hevur ment ein fyribyrgingarmyndil, sum skal lýsa ta torgreiddu heild, ið má vera støðið undir royndunum at fyribyrgja kriminaliteti. Tað hevur verið ógvuliga ymiskt, hvussu fólk, ið virka á hesum øki, hava hugsað um kriminalitetsfyribyrging, alt eftir fakligum støði, arbeiðsuppgávu ella øðrum. Fyribyrgingarmyndilin er eitt boð á eitt felags fatanargrundarlag at samskifta út frá, tá ið fleiri aktørar við ymiskum fortreytum hittast og skifta orð um ætlanir og íverksetan av átøkum, sum hava til endamáls at fyribyrgja kriminaliteti.

Endamálið at skapa øllum í samfelagnum góð, trygg og mennandi kor.




*Fyribyrgingarmyndilin, ið er ástøðið, at leggja til rættis átøkini í SSP.*

# myndil

**SOLEIÐIS VERÐUR MYNDILIN BRÚKTUR**
Myndilin kann gera tað lættari at fáa eina felags fatan sum støði undir teimum fakligu viðgerðunum, sum alla tíðina fara fram innan SSP. Eitt nú um, hvussu tey ymisku átøkini skulu raðfestast, hvør faklig umhugsan skal vera grundarlag undir einstøku átøkunum o.a.

Myndilin lýsir tørvin á at fáa tey trý stigini at hanga saman – tey uppbyggjandi átøkini skulu styðja upp undir tey fyribyrgjandi átøkini, sum síðani skulu styðja upp undir tey kriminalitetsfyribyrgjandi átøkini.

**UPPBYGGING**
Hugtakið uppbygging merkir tey átøk, sum snúgva seg um:

Henda breiða allýsing fevnir um tey átøk, sum styrkja bæði samfelagið og tann einstaka grundleggjandi. At hugtakið er niðast í myndlinum vísir, at tey uppbyggjandi átøkini eru grundarsteinarnir undir fyribyrgingararbeiðnum. Tað kunna vera politisk, umsitingarlig ella privat átøk, sum kunnu vera landsumfatandi ella lokal. Átøkini á uppbyggingarstiginum kunnu í størri ella minni mun hava kriminalitetsfyribyrgjandi árin, men grundgevingin fyri teimum er sjáldan tann, at tey eru kriminalitetsfyribyrgjandi. Grundgevingin fyri átøk á hesum stiginum er fyrst og fremst, at tey hava almennan týdning og eru gagnlig fyri øll.

Tað er sostatt ikki nóg mikið bara at gera átøk, sum eru kriminalitetsfyribyrgjandi, tí so verða vit ofta ov sein á sjóvarfallinum.

**VANDAFAKTORAR OG VERNDARFAKTORAR**
Vandafaktorar og verndarfaktorar verða allýstir eitt sindur ymiskt alt eftir hvørjum sambandi tað er í. DKR tekur støðið í hesum báðum allýsingunum:

Ein vandafaktorur boðar frá øktum sannlíkindum fyri kriminaliteti seinni. Gransking ger mun á einstaklingafaktorum, familjufaktorum, umhvørvisfaktorum og bygnaðarfaktorum. Lág sjávsstýring er eitt dømi um einstaklingavandafaktor, meðan rúsmisnýtsla hjá foreldrunum er ein familjuvandafaktorur.

Ein verndarfaktorur boðar frá lítlum sannlíki fyri kriminaliteti seinni og tekur burtur ella minkar árinið av vandafaktorum. Eisini her ger granskingin mun á einstaklingafaktorum, familjufaktorum, umhvørvisfaktorum og bygnaðarfaktorum. At hava eina jaliga sjálvsfatan er dømi um ein einstaklingaverndarfaktor, og tað at hava jalig viðurskifti við foreldrini er eitt dømi um ein familjuverndarfaktorur.

**Allýsingin**
íblástur frá David P. Farrington,
„Saving children from a life of Crime“. 2007

# TALGILT SAMSKIFTI Í SKÚLANUM

Endamálið við hesum heftinum er at hjálpa tykkara skúla í gongd við eitt samskifti um talgildan trivnað og virðir skúlans í sambandi við netmiðlanýtsluna hjá børnum og vaksnum. Í heftinum eru nøkur tvístøðukort, sum kunnu vera grundarlag undir arbeiðnum í ymisku eindunum í skúlanum: leiðslutoymi, skúlastýri, starvsfólk, næmingar og foreldur.

Í heftinum eru uppskot til arbeiðshættir, so bæði leiðsla, skúlastýri, foreldur, næmingar og lærararvið kunnu vera við í tilgongdini, og samskiftið soleiðis gongur millum hesar bólkar. Meira tilfar er at finna á netinum á www.digitaldialog.dk.




## MÁLBÓLKUR

Heftið vendir sær fyrst og fremst til skúlaleiðarar, skúlastýrir, lærarar og starvsfólk, sum halda, at tað er tørvur á at seta evnið á dagsskránna. Tilfarið kann eisini nýtast í øðrum hópi t.d. í frítíðarstovnum.

FØROYA LÆRARAFELAG · FØROYA TELE · Foreldrafelagið HEIM&SKÚLI · SSP · NÁM · barnabati



# Bóklingur um talgilt samskifti

Bóklingurin *Talgilt samskifti í skúlanum*,hevur til endamáls at hjálpa hvørjum einstøkum skúla at fara undir at viðgera hetta áhugaverda evnið í sambandi við netmiðlanýtsluna hjá børnum og vaksnum. Bóklingurin fevnir m.a. um nøkur sonevnd tvístøðukort, sum kunnu verða grundarlag undir arbeiðinum. Her eru eisini uppskot til arbeiðshættir, har bæði leiðsla, skúlastýri, foreldur og næmingar eiga lut í tilgongdini, samstundis um at hesir bólkar samskifta sínámillum.

SSP mælir til, at skúlarnir arbeiða við evninum eftir hesum leisti: Eitt fólk umboðandi SSP vitjar á skúlanum og leggur upp til eina tilgongd, sum fevnir um

1. Upplegg fyri skúlastýri og leiðslu
2. Skipa eina arbeiðsgongd og vegleiðing fyri akkersfólkið
3. Tíðarætlan

4 tímar eru settir av til hetta.

Hevur skúlin áhuga í hesum tilboði, ið er ókeypis, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við SSP ráðgevingina.

# SSP ÁLMANAKKI
# SKÚLAÁRIÐ 2016 – 2017

| EVNI: | MÁLBÓLKUR: | TÍÐARSKEIÐ: | LITUR: |
|---|---|---|---|
| Knýta sambond millum foreldrini | Øll foreldur | Alt árið | |
| Spælibólkar | Frá skúlabyrjan | Alt árið | |
| Tryggari á netinum | 4. flokkar | 24. oktober 2016 - 2. februar 2017 | |
| Ungur og lívið | 7. flokkar | 22. - 26. februar 2017 | |
| Ungur og lívið | 8. flokkar | Alt árið | |
| Kveikingardagur | | 4. november 2016 | |

**POLITI BJÓÐAR UNDIRVÍSING**

| | | |
|---|---|---|
| Ferðsluundirvísing | 1. flokkur | Alt árið |
| Etikkur á netinum | 6. flokkur | Alt árið |
| Harðskapur + revsiváttan | 9. flokkur | Alt árið |



fríggjadagin
4. november 2016 kl. 9-16
í Norðurlandahúsinum



# 8. KVEIKINGAR-DAGURIN

Ein kveikjandi dagur at stimbra tvørprofesionella samstarvið í SSP, at login áhaldandi brennur fyri rættindinum hjá børnum og ungum til eitt virðuligt lív.

## BRELLBITAR ÚR SKRÁNNI:

**Øll hava eitt ynski um eitt gott lív**
Martin Kúrberg leiðari á Herberginum

**Det uperfekte menneske har ikke længere sin gang på jorden**
Anne Lindhardt, yvirlækni og forkvinna í Psykiatrifonden

**Tvørprofessionelt samstarv sum lærusetningur og í verki**
Andy Højholdt lektor á Professionskolen Metropol

**At veksa inn í framtíðin**
Kjeld Fredens, professor Institut for Læring og Filosofi, Aalborg Universitet

SSP
Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi

# KNÝTA BOND
## MILLUM FORELDRINI

Foreldranetverk er, tá ið foreldur í einum flokki hittast og skifta orð um áskoðarnir, rammur og hugskot fyri trivnaðin og sosiala lívið í flokkinum.

Miðvíst arbeiði við trivnaðinum og vælferðini hjá næmingunum fremur umhvørvið fyri læring og menning av lívsførleikum.

**Hví skulu vit hava foreldranetverk?:**

- Innlit í støðuna hjá børnunum hjá hvør øðrum fremur trivnað.
- Fyribyrgja ósemjur, arging og happing.
- Felags rammur fyri veitslur, rúsdrekka, nær barnið skal verða inni o.l. stuðlar foreldrum sum uppalarar.
- Lættari at loysa trupulleikar, tá ið foreldrini kenna hvønn annan og hava avtalað, at tosa saman, um ein er í iva.
- At fyribyrgja misskiljingar, frustratión og óvissu í uppalingini.

Mælt verður til at skipa foreldranetverk frá skúlabyrjan.






# TRIVNAÐUR OG TRYGGLEIKI Á NETINUM

**Elektroniskir samskiftismiðlar eru ein partur av gerandisdegnum hjá børnum og ungum. Fartelefonin og internetið eru komin fyri at verða, og tú kanst eins væl taka í hondina á barninum og leiða tað gjøgnum vandarnar á netinum.**

Fyri at fyrbyrgja kriminaliteti við elektroniskum miðlum, er neyðugt við miðvísari undirvísing og átøkum, soleiðis bæði næmingar og foreldur fáa innlit og eru tilvitaði um at taka tey røttu valini.
Evnið er elektroniskt samskifti hjá børnum, og endamálið er at læra tey at ferðast tryggari á internetinum, læra tey at verja sínar upplýsingar og sítt privatlív og annars, hvar markið er fyri, hvat er loyvt og ikki loyvt at gera á netinum.



**4. FLOKKUR**
Sum upptakt til altjóða trygga internetdagin 2. feburar 2017, verður mælt til, at evnið verður viðgjørt saman við næmingarnar í 4. flokki. Átakið skal somuleiðis venda sær til foreldrini.

**Undirvísingartilfar:**
„At ferðast á netinum“

# UNG OG LÍVIÐ

Í fyribyrgjandi arbeiðinum skal arbeiðast miðvíst við at fremja hugburðin um tað góða lívið. At ein og hvør hevur ábyrgd fyri egnum gerðum. Ein týðandi táttur er fatanin av sosiala lívinum og upplivingar, sum javnaldrarnir halda vera rættar.

M.a. verður arbeitt við ábyrgdini at velja eitt virkið ungsdómslív uttan rúsdrekka, avbjóðingar í talgilda heiminum, vinarlag og venjingum sum aktivera næmingarnar og leggja upp til orðaskifti um hugburð og atburð.



**7. FLOKKUR**
Mælt verður til miðvísa frálæru í 7. flokkunum. Átakið skal somuleiðis venda sær til foreldrini og teirra leiklut sum uppalarar.

**8. FLOKKUR**
Mælt verður til at halda fast við ta tilgongd, ið byrja varð í 7. flokki viðvíkjandi rúsdrekka.

Undirvísingartilfar:
„PRÁT UM RÚSDREKKA“
„FORELDRAFUNDIR KUNNU MINKA UM DRYKKJUSKAPIN HJÁ UNGUM“
„SAMSPÆLIÐ“
„LION’S QUEST“

#samtykki




Sex uttan samtykki er brot á kynsligu rættindini og kropsliga sjálvræðið hjá tí einstaka.
**Les meira um mannarættindi og kropslig** rættindi á **www.amnesty.fo**

AMNESTY INTERNATIONAL




1. Gev tær stundir til at vera saman við barninum. Tann týdningarmesta fyribyrgingin er, at tú, heilt frá tí at barnið er lítið, syrgir fyri at vera við í lívinum hjá barni tínum. Brúkið tíð saman – spæl við barnið og hav tað við í tí, sum tit fáast við heima.

2. Nærvera. Set tær sum fast mál, at tú í minsta lagi eitt korter um dagin savnar teg um at vera 100 prosent saman við barninum. Sjálv/ur merkir tú væl, um tú veruliga ert til staðar ella ikki, og tað ger barn títt eisini.

3. Vís barninum álit. Skal barn títt læra at bera seg at við ábyrgd í samfelagnum, ert tú noydd/ur at vísa honum ella henni ábyrgd. Lat børnini vera uppií, tá ið avgerðir verða tiknar heima við hús og gev teimum á tann hátt lut í ábyrgdini av, hvussu tað gongur heima. Ábyrgdarkensluna taka tey við út í lívið uttan fyri heimið.

4. Lær barnið at loysa trupulleikar. Loys ikki trupulleikarnar fyri barnið, tí tað læra børn einki av. Er barnið komið í eina tvístøðu, so lat hana ella hann sjálva/n koma við uppskoti til eina loysn. Hjálpir tað ikki, so bein barnið á rætta leið, men tak ikki uppgávuna frá tí.

5. Viðurkenning eru av alstórum týdningi. Sjálvsvirðing minkar um vandan fyri, at ung enda úti í vandastøðum.  Styrk sjálvsvirðingina hjá barni tínum við nærveru og viðurkenning, tá ið barnið ger okkurt gott.

6. Gáa eftir broytingum. Gev gætur, um barn títt broytir atburð og hav eyga við niðanfyri nevndu teknum:

*Er tannáringurin brádliga ikki so nógv inni longur, eller læsir hann seg inni á kamarinum? Flákrar hon ella hann við eygunum og lurtar ikki eftir tí, tú sigur? Er í ringum lag og rópar um slíkt, sum hann ikki plagar at øsa seg um? Heldur hon ella hann seg fyri seg sjálva/n og tímir ikki at vera saman við tær og hinum í familjuni?*

7. Tak varhugan í álvara. Viðhvørt veitst tú bara, at tað ruggar ikki rætt, hóast tú ikki dugir at siga, hvat tað er, sum bagir. Tí skalt tú taka slíkar kenslur í álvara og reagera upp á tær, um tú heldur, at okkurt er ikki, sum tað eigur at vera.

8. Sig tað við barnið andlit til andlits. Hevur tú illtanka um, at barn títt hevur stolið, so spyr barnið, hvaðani tað hevur lutirnar ella peng-arnar, tí tú veitst, at barnið ikki eigur nakrar pengar. Spyr opið, uttan at vera dømandi.

9. Í skúla ella skulka? Hav eyguni við, at barn títt gongur í skúla hvønn dag. Gerst tú varugur við, at hann ella hon skulkar, so set teg í samband við skúlan og møguliga eisini við sosialu myndugleikarnar.

10. Tjekka uttan at bróta álitið. Ivast tú í, um barn títt fer í skúla ella bara lýgur um, hvar hann ella hon heldur til, so tjekka tað. Men ver ærligur um, at tú ætlar at ringja til skúlan ella foreldrini hjá vinfólkunum, so álitið ikki verður brotið.

11. Skipa eitt foreldrasamarbeiði. Allar royndir vísa, at eitt foreldrasamarbeiði kann hjálpa - ikki bara børnum og ungum í vandabólkum, men heilum flokkum.

Styrkin í samarbeiðinum er, at tit, sum foreldur læra at kenna hvønn annan og tí lættari megna at gera felags reglur fyri tykkara børn og ungdómar t.d. um, hvussu seint tey sleppa at vera úti, hvar tey kunnu vera og um rúsdrekka.
Tað ger tað eisini lættari at seta seg í samband við onnur foreldur, um tú hevur ampa av onkrum viðvíkjandi teirra barnið.

12. Tú skalt ikki vera illa við. Vilt tú hjálpa barninum, so er tað umráðandi at biðja um hjálp og siga frá tínum ekka á skúlanum, í frítíðartilhaldum ella hjá sosialu myndugleikunum.



# POLITI

## BJÓÐAR UNDIRVÍSING

**SKRÁIN:**

**1. FLOKKUR**
– ferðsluundirvísing

**6. FLOKKUR**
– etikkur á netinum

**9. FLOKKUR**
– harðskapur + revsiváttan

Nærri kunning og avtalur um undirvísingina fæst við at venda sær til SSP politistin í økinum ella á ssp@politi.fo

**MANNAGONGDIN:**

1. Flokslærarin og SSP lærarin velja og samskipa tiltøkini á skúlanum
2. SSP lærarin ger avtalur við SSP politistin um undirvísing

**SSP POLITISTAR**

| | |
|---|---|
| Tórshavn og har á leið: | Mariann Reinert, tlf. 284812 |
| Norðoyggjar og Eysturoy: | Sigmund Petersen, tlf. 792050 |
| Norðoyggjar og Eysturoy: | Birgir Magnussen, tlf. 287910 |
| Vágar og Norðstreymoy: | Ragnar í Haraldsstovu, tlf. 284388 |
| Sandoy: | Rosa Mortensen, tlf. 210658 |
| Suðuroy: | Lars Müller, tlf. 575661 |



# KRIMINALFYRIBYRGJANDI UNDIRVÍSING



**ENDAMÁL:**

- At tryggja at næmingurin skilir grundarlagið fyri at hava lógir og viðtøkur.
- At eggja næminginum til at fylgja og liva eftir hesum.
- At stuðla næminginum til at vera føran fyri sjálvstøðugt og ábyrgdarfult at velja eitt gott lív, bæði hvør sær og samfelagsliga.
- At næmingurin kennir møguleikarnar fyri revsingum og øðrum rættarligum fylgjum í sambandi við eitt lógarbrot – undir hesum, møguleikanum fyri endurgjaldskravi, og blett á revsiváttinina.

**HUGBURÐUR OG FATAN:**

- At fáa næmingin at skilja og viðurkenna teir kensluligu, viðkvæmu, sosialu og persónligu trupulleikarnar, sum eru orsøk til, at menniskju fremja lógarbrot.
- At fáa næmingin at viðurkenna, at tað er óhugaligt at vera útsettur fyri einum lógarbroti.
- At fáa næmingin at taka støðu til øll tey val, sum verður borðreitt fyri honum dagliga.

**ÁSETINGAR:**

- Undirvísingartímarnir skulu fyrireikast og fremjast soleiðis, at teir innihalda ein faktuellan part og ein hugburðsvirkandi part. Í faktuella partinum verður upplýst um rein fakta, meðan tað í tí hugburðsvirkandi partinum verður lagt upp til kjak um evnið, sum undirvísingin snýr seg um. Endamálið við kjakinum er, at vekja áhugan hjá næminginum um evnið.

# Barnavernd




Børn hava rætt til eitt gott lív, og lógin um barnavernd ger sítt til at tryggja hetta.

Landið er skipað í átta øki við hvør síni barnaverndartænastu. Barnaverndartænasturnar hava ábyrgd av, at børn, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, fáa neyðugu hjálpina. Ymsar fyriskipanir verða tá settar í verk í samstarvi við foreldramyndugleikan.

Tað hevur avgerandi týdning, at vit øll gáa eftir, um børnini trívast. Tá tú er stúrin um eitt barn, kann verða neyðugt at boða barnaverndartænastuni frá, so nakað verður gjørt við støðuna. Eisini tá er sera umráðandi at samstarva við foreldrini, so gongdar leiðir kunnu finnast í felag.

**Les meira um barnavernd á bvs.fo**

Barnaverndarstova Føroya

# Barnahúsið

Tað er ein ótespilig sannroynd, at tað finnast børn og ung, sum eru fyri harðskapi og kynsligum ágangi.

Eitt Barnahús er tí sett á stovn, sum skal tryggja eitt gott og skipað tvørfakligt arbeiði við børnum og avvarðandi í málum um kynsligan ella annan ágang.

Í Barnahúsinum verður samstarvað tvørtur um kommunu- og fakmørk: millum barnaverndartænastu, løgreglu og heilsuverk, og partarnir gera í mest møguligan mun sítt arbeiði inni har.

Barnahúsið er eitt barnavinarliga innrættað hús, so barnið skal kenna seg trygt. Í Barnahúsinum verður málið kannað, avhoyringin verður fest á band og barnið kann fáa kreppuhjálp saman við teimum avvarðandi. Serligt fyrilit verður sostatt tikið fyri einstaka barninum, so tað sleppur undan at endurtaka sína frágreiðing fleiri ferðir.

Mannagongdin er tann, at tá mál um harðskap og kynsligan ágang koma fram, heita barnaverndartænasturnar á Barnahúsið um at greiða málið.

Barnaverndarstova Føroya umsitur og rekur Barnahúsið, og eitt fast starvsfólkatoymi, ið er serútbúgvið og serliga skikkað at taka sær av málum um ágang móti børnum, er knýtt at húsinum.



Barnahúsið varð sett á stovn 1. januar 2014, og er eitt samstarv millum Barnaverndarstovuna og Almannaráðið.

Les meira um **Barnahúsið** á **bvs.fo**

# KYNSLIGUR ÁGANGUR SKAL ONGANTÍÐ GÓÐTAKAST

"Málið er, at einki barn í Føroyum skal vera fyri ágangi. Og fyri tey, sum hava verið fyri ágangi, eiga vit at gera alt, vit eru før fyri, til tess at bøta um árinini."

**HEILDARÆTLAN UM KYNSLIGAN ÁGANG – 8 ÁTØK**

Les meira
**Almannamálaráðið**
www.amr.fo




Barnabati arbeiðir fyri at hjálpa og bøta um kor, uppvøkstur og menning hjá børnum og ungum í Føroyum. Vit ynskja, at øll børn hava møguleika til persónliga menning, og at tey fáa tann stuðul og umsorgan, tey hava tørv á.

# TÚ & EG

## Ráðgevingin

Tú & Eg Ráðgevingin er eitt ókeypis tilboð um anonyma hjálp. Óheft av átrúnaðarligum og politiskum hugburði veitir ráðgevingin neutrala og holla fakliga upplýsing, vegleiðing og ráðgeving til øll tey, sum seta seg í samband við hana umvegis telefon, kjatt, bræv ella SMS.



**BARNABATI**
**TÚ & EG RÁÐGEVINGIN**
Niels Finsensgøta 32 - 2.Hædd    100 Tórshavn    +298 522011
barnabati@barnabati.fo    www.barnabati.fo
www.facebook.com/barnabati



# RIGGA NÆMINGARNAR

# TIL AT VELJA RÆTT Í FERÐSLUNI

**YVIRSKIPAÐ MÁL**

**1. - 3. FLOKKUR**
Næmingurin dugir reglur og hugburð um at bera seg rætt at til gongu í ferðsluni, nýta hjálm, endurskin og bilbelti

**4. - 6. FLOKKUR**
Næmingurin lærir ástøðið at bera seg rætt at á súkklu og í myrkri í ferðsluni

**7. - 9. FLOKKUR**
Næmingurin fær ment sínar førleikar at taka trygg val í ferðsluni í mun til ferð, rúsdrekka, trygdarbelti og gáloysni

**RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD**

Hagtøl siga okkum, at tá ið tey ungu eru 15 ár standa tey á gáttini til tey 10 vandamestu árini í ferðsluni. Tað er her, at tey ungu eru yvirumboðað í ferðsluvanlukkum, bæði sum skadd og deyð.Tí mugu vit halda fast í nullhugsjónini um at eingin má doyggja ella fá álvarsligt mein í ferðsluni.

Tí ræður um at skipa dygga frálæru um ferðslu frá skúlabyrjan.

**Á www.snar.fo/ferdsla er nýtt og ókeypis talgilt undirvísingartilfar í ferðslu tøkt til øll floksstig at brúka**

**Foreldur skulu takast við**
Atferðin hjá foreldrum í ferðsluni hevur stóran týdning fyri, hvussu børnini bera seg at, og hvønn váða tey taka. Tí verða foreldrini tikin við í ferðslutilfarinum – í foreldrabrøvum, foreldrafundum og í filmi.

*Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til rff@rff.fo.*



# BARNANNA UMBOÐSMAÐUR ANSAR EFTIR

at myndugleikar og stovnar virða rættindini hjá børnum og ungum.

## Barnanna umboðsmaður kann til dømis hjálpa tær í hesum førum:

- Skúlin ella málsviðgerin lurtar ikki eftir tær
- Tú vart ikki spurd/ur um tína meining, áðrenn ein avgerð varð tikin um teg
- Tú hevur tað ikki gott hjá fosturfamiljuni

## Tú kanst fáa hjálp frá Barnanna umboðsmanni við at:

- Ringja til okkum á tlf. **35 85 00**
- Senda ein teldupost til **bum@bum.fo**
- Fylla út eitt oyðublað á heimasíðuni **www.bum.fo** og senda tað við brævi til

  Løgtingsins umboðsmann<br>
  undir Bryggjubakka 11<br>
  Postsmoga 2008<br>
  110 Tórshavn
- Koma inn á gólvi hjá okkum undir Bryggjubakka 11 í Havn (í Vágsbotni) millum kl. 10 og kl. 15 hvønn gerandisdag.



Vitja bum.fo og lær meira

SENDISTOVAN

# WWW.BERIN.FO

BERIN





# Øll hava rætt til GÓÐ BARNAÁR

"Eg fann útav, at tað eri ikki bara eg." (Drongur, 10 ár)

"At møta øðrum, sum eru í líknandi støðu, hevur gjørt, at eg ikki kenni meg so einsamalla meira, og eg skilji nú, at tað ikki er mín skyld, at mamma drekkur."

(Genta, 12 ár)

"Øll hava rætt til góð barnaár" er ein liður í fyribyrgjandi verkætlanini hjá Bláa Krossi Føroya, har vit bjóða børnum og ungum, ið hava foreldur við rústrupulleikum, í bólk saman við øðrum børnum, sum eru í líknandi støðu.

Hevur tú hug at koma í bólk, ella kennir tú onkran, sum kanska hevur hug, ella vilt tú vita meira, er tú vælkomin til at seta teg í samband við bólkaleiðararnar við senda ein teldupost til:

bolkar@blakross.fo

ella ringja á telefon:
770708 ella 770709

Ella vitja okkara síðu á Facebook,
Øll hava rætt til góð barnaár

Bláí Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS

# FYRIBYRGJANDI ARBEIÐI OG SPÆLIBÓLKAR

# – HVAT KUNNU VIT GERA?



**SPÆLIBÓLKAR:**

Børnini ganga í flokki saman í nógv ár, og hóast tey eru saman øll hesi árini og allar skúladagarnar, er als ikki vist, at tey kenna hvønn annan serliga væl. Tey hava kanska eina mynd av hvørjum øðrum, sum í summum førum passar væl, og í øðrum førum er heilt av leið. Spælibólkar er eitt umhvørvi, har øll hava møguleika at verða sædd og hoyrd og koma til orðanna og er ein sera góður máti at arbeiða við trivnaði. Allir limirnir í bólkinum sleppa at vísa sítt virði í tryggum heimligum umhvørvi, ið foreldrini vara av. Samumtikið snýr tað seg um at styrkja sosiala kapitalin í einstaka flokkinum.

# Spæliliðið

## – meira rørsla, betri trivnaður

AKT og SSP hava eitt felags endamál, sum er at arbeiða við átøkum fyri at fáa næmingarnar at trívast.




Endamálið við Spæliliðnum er at fáa næmingar at røra seg meir og verða kropsliga virknar. Dentur verður lagdur á at fáa teir yngru næmingarnar at spæla í skúlagarðinum í fríkorterunum.

Ein partur í uppgávuni hjá Spæliliðnum er eisini at bøta um trivnaðin. Spæliðið er á henda hátt við til at skapa lív í skúlagarðinum – bæði kropsliga og sosialt.

Næmingar úr 7. flokki skipa fyri. Hesir næmingar hava verið á skeiði, har teir venja hvussu teir kunnu standa fyri uppgávuni. Fyri at tryggja at tey ungu í spæliliðnum hava ábyrgdarfólk at venda sær til, er ein lærari akkersfólk hjá Spæliliðnum.

Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi

Vitja okkum á

facebook

FØROYAPRENT I SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705